## Nógv tøka í viku 8

Fyrstu síllini í ár vórðu tikin í síðstu viku, tá 62.590 kilo vórðu slaktað. Somu viku vórðu heili 1.065.963,8 kilo av laksi tikin, so tilsamans slaktaðu føroysku alararnir 1.128.553,8 kilo av alifiski. Annars hevur ikki verið tikið so nógvur alifiskur higartil í ár, nevniliga 5.362.332,75 kilo. Framroknað gevur hetta eitt samlað tal av alifiski upp á 34.500 tons, sum er nærum 4.000 tons færri enn í fjør. Men Havbúnaðarfelagið væntar kortini eina samlaða tøku í ár upp á umleið 50.000 tons.



## Stórur áhugi fyri Saab

Átta potentiellir keyparar eru, sambært forstjóranum í Saab, Jan-Åke Jonsson, áhugaðir í at keypa fyritøkuna. Hann er bjartskygdur um møguleikan at finna eina skjóta loysn. – Eg havi gópar vónir um, at vit finna ein nýggjan kapitalsterkan eigara, bæði innan og uttann fyri bilídnaðin, sigur Jan-Åke Jonsson við e24.se. Saab nýtir týska stórbankan Deutsche Bank at finna nýggjan eigara. Bilframleiðarin er ógvuliga kroystur, og hevur í fyrsta umfari fingið tríggjar mánaðir at finna ein keypara. Talan hevur verið um, at Opel hevur víst áhuga fyri Saab, men tað vísir forstjórin aftur. – Vit skulu hava ein eigara, sum er fíggjarliga sterkur, sigur Jan-Åke Jonsson sambært Boersen.dk



*Hetta er ikki væl umtókt í Bretlandi og kann kosta íslendsk, føroysk og norsk arbeiðspláss (Mynd: Morgunblaðið)*

# Bretar boykotta fiskvørur úr Føroyum, Íslandi og Noregi

**Bretska handilsketan Waitrose vil ikki selja føroyskar, íslendskar og norskar fiskavørur, tí hesi londini veiða hval**

HANDIL

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í Íslandi eru 250 arbeiðspláss í fiskaídnaðinum í vanda, nú tann stóra, bretska handilsketan Waitrose hevur gjørt av gevast við at selja íslendskar fiskavørur í sínum handlum.

Orsøkin til avgerðina er, at íslendska stjórnin hevur samtykt at taka hvalaveiði uppaftur. Men sambært Morgunblaðnum umfatar sølubannið ikki einans fiskavørur úr Íslandi, men eisini norskar og føroyskar fiskavørur, tí føroyingar og norðmenn veiða eisini hval.

Waitrose keypir árliga íslendskar fiskavørur fyri millum tríggjar og hálva fjórðu milliard íslendskar krónur. Millum íslendsku virkini, sum hava selt bretsku handilsketuni fiskavørur, er Frostfiskur ehf, sum er í Þorlákshöfn á Suðurlandinum. Stjórin á virkinum, Steingrímur Leifssonm, sigur við Morgunblaðið, at tey hava selt bretsku handilsketuni vørur fyri umleið eina milliard íslendskar krónur um árið.

-Umleið 250 arbeiðspláss, sum eru beinleiðis ella óbeinleiðis knýtt at framleiðsluni til Waitrose, eru í vanda, sigur Steingrímur Leifsson. Hann hevur fingið bræv frá leiðsluni í Waitrose, har handilsketan ger vart við, at verður hvalaveiðan undir Íslandi tikin uppaftur, gevst handilsketan at keypa íslendskar vørur.

Umleið 100 fólk arbeiðs á Frostfiski ehf, og stjórin stúrir fyri, at hann má koyra helvtina av arbeiðsfólkinum til hús, missir virkið søluna til Waitrose.



FAROE SEAFOOD – EIN TRÚGVUR FELAGI

Faroe Seafood fiskar, virkar og selur eitt stórt úrval av fiskaúrdráttum. Vit keypa ráfisk frá skipum og bátum. Vit kunna bjóða landing á landingarmiðstøðum okkara og selja ís til skip.

Keyp av ráfiski, tlf. 35 55 55 ella 55 55 55.

Landingarmiðstøðir:
Kongshavn P/f, Saltangará, tlf. 77 00 80
Faroe Seafood, Vestmanna, tlf. 59 42 16
Faroe Seafood, Runavík, tlf. 59 26 25
Faroe Seafood, Vágur, tlf. 59 85 15
Faroe Seafood, Tórshavn, tlf. 59 40 16

Ísavgreiðsla:
Faroe Seafood, Vestmanna, tlf. 59 42 26
Faroe Seafood, Runavík, tlf. 59 26 26
Faroe Seafood, Vágur, tlf. 59 85 26
Faroe Seafood, Toftir, tlf. 59 27 26

www.faroe.com

FAROE SEAFOOD

SENDISTOVAN